# Føroya Ráfiskakeyparafelag

# Ársfrágreiðing fyri 2008

Ein lýsing av fiskivinnuni og virkseminum hjá felagnum

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

## Samandráttur og frágreiðing frá nevndini

Um hugt verður eftir almennu roknskapartølunum fyri 2007, sæst at samlaða úrslitið hjá ráfiskakeyparum var sera vánaligt. Skulu vit lýsa gongdina hjá teimum feløgnum, ið primert eru ráfiskakeyparar er tó helst rættast at korrigera fyri óvanligum niðurskrivingum og úrsliti frá dóttur- og assosieraðum feløgum. Um hetta verður gjørt, fæst eitt samlað úrslit, áðrenn skatt og óvanligar postar, sum gevur eitt hall á umleið 5 mió.kr. - Viðmerkjast skal tó, at flestu feløgini høvdu avlop áðrenn rentur.

Flestu almennu roknskapirnir fyri 2008 eru ikki tøkir enn, men tað ljóðar frá virkjunum, at myndin helst líkist henni frá 2007. Nøkur virkir kláraðu seg ikki væl í 2008 og okkurt teirra er fyribils latið aftur, meðan onnur hava gjørt nýggjar avtalur við fíggingarstovnar og kunnu tí halda fram.

Hinvegin hava nøkur virkir klárað seg væl í 2008 og kunnu helst vísa á betri úrslit enn í 2007.

Lønargjaldingarnar í fiskavøruídnaðinum vóru umleið 315 mió.kr. í 2008, samanborið við 350 mió.kr. í 2007.

Samlaða útflutningsvirðið á fiskavørum var í 2008 umleið 3,5 mia.kr. Í mun til 2007 var hetta ein lækking á 266 mió.kr., ið svarar til umleið 7%. Í nøgd varð útflutningurin í 2008 gjørdur upp til 329.000 tons. Hetta er ein lækking á umleið 60.000 tons í mun til árið fyri. Lækkingarnar stava serliga frá minni útflutningi av fiskamjøli, hýsu, svartkjafti, lodnu, makreli, og havtasku. Hinvegin eru útflutningur av laksi øktur munandi, bæði í nøgd og virði.

Feskfiskaveiðan var góð 111.000 tons í 2008, og er hetta ein minking uppá umleið 10.000 tons í mun til veiðuna í 2007. Havast skal tó samstundis í huga, at veiðan í 2006 var 134.000 tons, og at minkingin seinastu tvey árini sostatt tilsamans er umleið 23.000 tons, ið svarar til 17% av veiðuni í 2006.

Í grundgevingunum fyri sínum tilmæli til fiskiskapin undir Føroyum, í fiskiárinum 2008/2009, sigur Havstovan, at stovnarnir av toski á Føroyabanka og á landgrunninum eru søguliga illa fyri, at hýsustovnurin er í skjótari minking, meðan upsastovnurin hinvegin er hampuliga væl fyri. Samanumtikið mugu vit tí helst ásanna, at útlitini fyri fiskiskapinum eftir toski og hýsu ikki eru nakað serlig og at tað er mangt, ið bendir á, at veiðunøgdin av toski og hýsu eisini fer at minka í 2009. Hinvegin kann tað kanska liggja ein vón í, at útlitini hava verið líka ring onkuntíð fyrr og at tað tá kortini hevur bragdað aftur.

Verður hugt eftir fiskiskapinum undir Føroyum fyrstu tveir mánaðirnar í ár, í mun til fyrstu tveir mánaðirnar í 2008 sæst, at fiskiskapurin í ár er nakað tann sami sum í fjør. Bæði árini liggur samlaða veiðunøgdin fyri hesar báðar mánaðirnar um 18.600 tons. Líkt er tó til, at keðiliga

gongdin í toska- og hýsufiskiskapinum heldur fram, men veiðan av upsa sær út til at økjast aftur.

Mál, sum í 2008 hava verið viðkomandi fyri limirnar í Føroya Ráfiskakeyparafelagi, eru annars m.o. hesi:

Spurningurin um útlendska arbeiðsmegi endaði við nøkrum lógarbroytingum, sum skulu gera tað lættari hjá útlendskari arbeiðsmegi at koma til Føroyar. Endamálið við hesum broytingum er, at tað skal gerast lættari hjá ES-borgarum, at fáa arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum. Fyri borgarar uttanfyri ES, eru treytirnar tó framvegis tær somu sum áður.

Tað hevur eisini týdning fyri virkini, at arbeiðsloysið í Føroyum nú økist, og at tað tí er lættari at fáa fatur á arbeiðsmegi.

Í sambandi við gjaldføriskreppuna, ið rakti so at siga allan heimin sera meint í 2008, var ein trupulleiki, at føroyskir fiskaútflytarar mistu tryggingar uppá nakrar av sínum kundum. Avleiðingin av hesum var, at fíggjarstovnar ikki kundu fíggja sølukredittirnar og tí var vandi fyri, at virkini komu at liggja inni við stórum goymslum.

Ráfiskakeyparafelagið hevur fylgt við hesum trupulleika og luttók í desember á einum fundi í Eksport Kredit Fonden (EKF), saman við umboðum fyri Vinnumálaráðið. Endamálið við fundinum var at kanna hvørjar møguleikar føroyskir útflytarar hava fyri at brúka tilboð hjá EKF. Tað nýggjasta í hesum máli er, at EKF hevur biðið ES um undantaksloyvi til at endurtryggja útflutningstryggingar av sølu til keyparar í ES og OECD londum. Enn er hetta loyvi tó ikki givið.

Summir limir í felagnum hava verið ónøgdir við verandi kassa- og flutningsskipan hjá Kassamiðstøðini (KMS) og hava tosað um at taka seg úr skipanini. Fyri at kanna um møguleiki var fyri at tillaga skipanina soleiðis, at áhugi framvegis var hjá øllum at halda fram, tók felagið stig til ein partaeigarafund í KMS. Niðurstøðan er, at KMS ikki ætlar at gera nakrar tillagingar nú, men metur tað vera skilagott at bíða til framtíðarútlitini vera meira støðug.

ES-ráðið samtykti í heyst eina nýggja fyriskipan um ólógligan, ófráboðaðan, og óskipaðan fiskiskap (IUU fishing), sum kemur at hava stóran týdning fyri øll, ið fiska og útflyta fisk og fiskavørur til ES marknaðin. Henda fyriskipan kemur í gildi 1. januar 2010. Føroyska fyrireikingararbeiði til hesa eftirlitsskipan, er í løtuni í gongd í Fiskimálaráðnum, men Føroya Ráfiskakeyparafelag eigur at fylgja við og tryggja sær, at føroyskir myndugleikar eru klárir við einari loysn í góðari tíð áðrenn ES-fyriskipanin verður sett í verk.

Umhvørvismerking er framvegis á dagsskrá og alt fleiri fiskiskapir søkja um umhvørvismerki. Nevnast kann í hesum sambandi, at Felagið Nótaskip hevur avgjørt at biðja um MSC-góðkenning til partar av teirra fiskiskapi. Í okkara felag mugu vit tó ivaleyst ásanna, at umhvørvismerking neyvan er nakað, sum vinnan verður samd um í bræði. Skal nakað henda á hesum øki, má initiativið tí helst koma frá einstøkum aktørum í vinnuni.

Fleiri virkir høvdu í fjør vitjan av eftirlitsmyndugleikum úr ES. Eftirlitið var sum so ikki av sjálvum virkjunum, men av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni (HFS). Endamálið hjá ES-myndugleikunum, var at tryggja sær, at HFS fremur sítt eftirlit á nøktandi hátt.

Ráfiskakeyparafelagið hevði ein leiklut í hesi vitjan, á tann hátt, at vit samskipaðu kunning millum virkini. Hetta varð gjørt soleiðis, at tey virkir, ið fyrst fingu vitjan, boðaðu frá hvat ES-fólkini løgdu dent á. Á henda hátt høvdu tey virkir, ið vóru seinni í røðini, møguleika at taka hædd fyri hesum.

Aftan á vitjanina hevur Ráfiskakeyparafelagið eisini skipað fyri einum fundi millum umboð fyri HFS og vinnuna, har niðurstøðurnar frá ES-vitjanini vórðu gjøgnumgingnar.

Seinni í hesari vikuni hevur felagið eisini tikið stig til ein fund millum umboð fyri HFS og virkini. Ætlanin við hesum fundi er at leggja lunnar undir eitt betri og meira langsiktað samskifti millum HFS og virkini.

Nýggj matvørulóg hevur verið til hoyringar og hevur felagið í hesum sambandi latið Vinnumálaráðnum hoyringsskriv.

Felagið hevur saman við m.a. SamVit tikið stig til at skipa fyri einari ráðstevnu, ið eftir ætlan verður hildin saman við Fish Expo Faroes síðst í mai. Fyrireikingarnar eru komnar væl áleiðis og sær ráðstevnan sera spennandi út.

Felagið hevði fyrr í ár lagt ein limafund til rættis í Suðuroynni. Tíverri var eingin undirtøka fyri hesum fundi og varð han tí avlýstur.

Víst verður annars til samlaðu ársfrágreiðingina, ið er tøk á aðalfundinum og annars verður løgd út á heimasíðuna hjá Vinnuhúsinum.

# Innihald

**INNGANGUR** .......... **5**
RÁFISKAKEYPARAFELAGIÐ .......... 5
**UM FISKI- OG FLAKAVINNUNA** .......... **6**
ÚTFLUTNINGURIN .......... 6
RÁVØRUTILGONGDIN TIL VINNUNA .......... 8
MIÐAL AVREIÐINGARPRÍSIR .......... 9
ÚTFLUTNINGUR AV HEILUM KØLDUM FISKI .......... 10
AVREIÐINGAR UTTANLANDS .......... 11
FLAKAVINNAN .......... 12
VEIÐULIÐIÐ .......... 14
GONGDIN FYRSTU TVEIR MÁNAÐIRNAR AV 2009 .......... 14
ÚTLITINI FYRI FISKISKAPIN UNDIR FØROYUM .......... 15
**VIRKSEMI FELAGSINS Í FARNA ÁRI** .......... **16**
FRAMTÍÐIN HJÁ FELAGNUM .......... 16
ARBEIÐSMARKNAÐARSPURNINGURIN .......... 17
ÚTFLUTNINGSTRYGGING- OG FÍGGING .......... 17
KASSAMIÐSTØÐIN .......... 17
ELEKTRÓNISK SPORFØRISSKIPAN .......... 18
ÓLÓGLIGUR, ÓFRÁBOÐAÐUR OG ÓSKIPAÐUR FISKISKAPUR (IUU FISHING) .......... 19
UMHVØRVISMERKING .......... 19
EFTIRLITSVITJAN ÚR ES .......... 20
FUNDUR VIÐ FISKIMÁLARÁÐHARRAN .......... 20
BÓKLINGAR .......... 21
RÁÐSTEVNA SEINNI Í VÁR .......... 21
YMISK MÁL .......... 21

# Inngangur

Henda ársfrágreiðing varð løgd fram á aðalfundinum hjá Føroya Ráfiskakeyparafelag tann 14. apríl 2009. Ráfiskakeyparafelagið er eitt áhugafelag hjá ráfiskakeyparum í Føroyum. Uppgávan hjá felagnum er at menna vinnuna í samstarvi við einstøku limirnar, myndugleikar og stovnar, ið varða av fiskivinnuni. Felagið heldur til í Vinnuhúsinum og hevur felags umsiting við Føroya Arbeiðsgevarafelag og øðrum vinnufeløgum.

Endamálið við frágreiðingini er at geva limum okkara og øðrum áhugaðum eina stutta lýsing av gongdini í fiski- og flakavinnuni og virksemi felagsins.

## Ráfiskakeyparafelagið

Í nevndini fyri Føroya Ráfiskakeyparafelag eru:

Simon P. Jacobsen, formaður

Joen Magnus Rasmussen, næstformaður — Petur Mohr

Jógvan Gregersen — Páll Gregersen

Limirnir í Føroya Ráfiskakeyparafelag eru:

| | |
|---|---|
| Farlta P/F | Sandoy Seafood P/F |
| Delta Seafood | Eystís P/F |
| J.M.A. v/Jógvan Absalonsen | Thomson P/F |
| Faroe Seafood P/F | Norðís P/F |
| Tavan Sp/f | Suðuroyar Fiskakeyp |
| Vaðhorn Seafood P/F | Rainbow Seafood Sp/f |
| Fiskavirkið P/F | Faroe Marine Biotech P/F |
| Kósin P/F | Norfra Sp/f |
| Hvilvtenni P/F | Eldborg Fisk Sp/f |
| Nevið Fiskaeksport Sp/f | |

# Um fiski- og flakavinnuna

## Útflutningurin

Samlaði føroyski útflutningurin av fiskavørum í nøgd og virði er vístur í mynd 1. Í nøgd er útflutningurin í 2008 gjørdur upp til 329.000 tons. Hetta er ein minking á umleið 60.000 tons í mun til 2007, men tó kortini eitt sindur meir enn samlaða nøgdin í 2006. Sambært hagtølunum stavar lækkingin serliga frá útflutningi av fiskamjøli, makreli, lodnu, svartkjafti og hýsu. Hinvegin er nøgdin av laksi økt uppí 30.000 tons, sum nærum er ein tvífalding av nøgdini í 2007. Nøgdin av sild øktist eisini nógv; úr umleið 40.000 til umleið 50.000 tons.

Lækkingin í samlaðu nøgdini sæst eisini aftur í útflutningsvirðinum, ið er minkað við 266 mió.kr., ella við umleið 7 prosentum. Samlaða útflutningsvirðið á fiskavørum kom í 2008 niður á 3,5 mia.kr. Størstu einstøku virðislækkingarnar vóru at síggja í útflutningum av fiskamjøli, hýsu, svartkjafti og havtasku, ið minkaðu við ávikavist 243, 151, 132 og 67 mió.kr. Største einstaki virðisvøksturin var útflutningurin av laksi, ið øktist við 322 mió.kr. Onnur fiskasløg, við hægri útflutningsvirði í 2008 enn í 2007, vóru m.a. síl, sild, gullaksur og svartkalvi. Útflutningsvirðið á hesum fiskasløgum øktist við ávikavist 37, 34, 29 og 19 mió.kr.

Í skjali 1, sum sæst aftast í hesari frágreiðing, er eitt útgreina yvirlit yvir útflutningsnøgd og – virði fyri flestu fiskasløg.




*Mynd 1. Útflutningur av fiskavørum: Nøgd og virði frá 2000 til 2008 (Kelda: Hagstova Føroya)*

Samlaða útflutningsnøgdin av flaki - frystum og køldum - úr toski, hýsu og upsa, var umleið 500 tons størri í 2008 enn í 2007, men hinvegin var útflutningsvirðið av hesum vørum góðar 43 mió.kr. lægri í 2008. Tvær frágreiðingar eru til lækkaða virðið. Onnur er, at prísurin á toskafløkum í miðal var umleið 6 kr/kg lægri í 2008 enn í 2007. Hetta er ein lækking, ið svarar til næstan 13%, og sum við óbroyttari nøgd av toskafløkum merkti, at útflutningsvirðið minkaði við 37 mió.kr.

Hin orsøkin er broytta nøgdarsamansetingin av hýsu og upsa. Nøgdin av hýsufløkum minkaði nevniliga við 2.300 tonsum, meðan nøgdin av upsafløkum øktist við 2.900 tonsum. Miðalprísurin pr. kg av hesum vørum var hinvegin nøkulunda tann sami í 2007 og 2008; ávikavist góðar 30 kr. fyri hýsufløkini og góðar 20 kr. fyri upsafløkini. Samlað ávirkanin, ið broytta nøgdarsamansetingin hevði á útflutningsvirðið, var ein virðislækking á umleið 6 mió.kr.

| | **Nøgd í tonsum** | | **Virði í 1.000 kr.** | | **Miðalprísur/kg.** | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | **2007** | **2008** | **2007** | **2008** | **2007** | **2008** |
| **Flak, fryst og kølt** | | | | | | |
| Toskur | 5.828 | 5.803 | 280.769 | 243.945 | 48,17 | 42,04 |
| Hýsa | 4.838 | 2.511 | 147.440 | 77.104 | 30,47 | 30,71 |
| Upsi | 17.956 | 20.849 | 361.604 | 425.306 | 20,14 | 20,40 |
| **Tilsamans** | **28.623** | **29.162** | **789.813** | **746.355** | **27,59** | **25,59** |
| | | | | | | |
| **Saltfiskur, flaktur og flak** | | | | | | |
| Toskur | 5.591 | 5.287 | 296.127 | 306.527 | 52,97 | 57,98 |
| Hýsa | | | | | | |
| Upsi | 3.054 | 1.960 | 43.444 | 26.141 | 14,22 | 13,34 |
| **Tilsamans** | **8.645** | **7.247** | **339.571** | **332.668** | **39,28** | **45,91** |
| | | | | | | |
| **Heilur fiskur, frystur og køldur** | | | | | | |
| Toskur | 2.117 | 1.736 | 51.838 | 34.108 | 24,49 | 19,65 |
| Hýsa | 7.056 | 4.285 | 127.012 | 69.360 | 18,00 | 16,19 |
| Upsi | 3.891 | 1.574 | 25.630 | 10.348 | 6,59 | 6,57 |
| **Tilsamans** | **13.064** | **7.595** | **204.480** | **113.816** | **15,65** | **14,99** |

*Mynd 2. Útflutningur í nøgd og virði, býtt á vørubólkar av toski, hýsu og upsa (Kelda: Hagstova Føroya)*

Nøgdirnar av útfluttum saltfiski minkaðu aftur í 2008. Samlaða tonsatalið varð 7.247 í mun til 8.645 í 2007. Munurin er 1.400 tons, harav 1.100 tons stava frá minni nøgdum av upsa og 300 tons frá minni nøgdum av toski. Orsakað av, at miðalprísurin á saltaðum toski er munandi hægri enn á saltaðum upsa, og at toskaprísurin var 5 kr/kg hægri í 2008 enn í 2007, sæst lutfallsliga stóra lækkingin í tonsatalinum tó ikki so væl aftur í útflutningsvirðinum,

sum var knappar 340 mió.kr. í 2007 og knappar 333 mió.kr. í 2008. Hetta svarar til eina minking á umleið 7 mió.kr.

Útfluttu nøgdirnar av frystum og feskum óvirkaðum fiski, eru nógv minkaðar í 2008, bæði í nøgd og virði. Samanlagt eru nøgdirnar av toski, hýsu og upsa minkaðar við 5.500 tonsum, ið svarar til eina afturgongd á umleið 42%. Herav er hýsa minkað við 2.800, upsi við 2.300 og toskur við 400 tonsum.

Virðið er minkað við 91 mió.kr, harav hýsa við 58, toskur við 18 og upsi við 15 mió.kr. Talvan í mynd 2 vísir, at meðan prísurin á heilum upsa í miðal hevur verið tann sami í 2008 sum í 2007, so er prísurin á hýsu og toski lækkaður ávikavist 10 og 20%.

## Rávørutilgongdin til vinnuna

Um hugt verður eftir fiskiskapinum seinastu tvey árini, kann staðfestast, at feskfiskaveiðan í 2008 var 8% lægri enn í 2007. Samlaða veiðunøgdin í 2008 var góð 111.000 tons, í mun til 121.000 tons í 2007. Havast skal samstundis í huga, at veiðan í 2006 var 134.000 tons, og at minkingin seinastu tvey árini sostatt tilsamans er 17%.

Avreiðingarvirðið í 2008 var slakar 900 mió.kr., samanborið við 1,16 mia.kr. í 2007 og 1,25 mia.kr. í 2006. Lutfallsliga svarar hetta til eina virðisminking í 2008 uppá 23%, í mun til 2007, og umleið 29% í mun til 2006.

Talvan í mynd 3 vísir, at minni er avreitt av flestu fiskasløgum í 2008 enn í 2007. Í tonsum er tað serliga lækkingarnar á hýsu og upsa, við ávikavist 5.400 og 4.400 tonsum, ið skilja seg burturúr, men við heili 42 prosentum, eru tað tó nøgdirnar av hýsu, ið lutfallsliga minka nógv mest.

| | Nøgd í tonsum | | Virði í 1.000 kr. | | Miðalprísur pr. kg | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Fiskaslag** | **2007** | **2008** | **2007** | **2008** | **2007** | **2008** |
| **Toskur** | 12.829 | 11.734 | 291.387 | 237.948 | 22,71 | 20,28 |
| **Hýsa** | 12.870 | 7.453 | 178.353 | 84.154 | 13,86 | 11,29 |
| **Upsi** | 55.326 | 50.872 | 289.891 | 258.653 | 5,24 | 5,08 |
| **Annar botnfiskur** | 12.668 | 11.853 | 132.680 | 109.605 | 10,47 | 9,25 |
| **Flatfiskur tils.** | 6.118 | 5.379 | 176.470 | 112.867 | 28,84 | 20,98 |
| **Onnur fiskasløg tils.** | 21.235 | 24.293 | 95.375 | 94.322 | 4,49 | 3,88 |
| **Veiðan tilsamans** | 121.045 | 111.585 | 1.164.155 | 897.549 | | |

*Mynd 3. Feskfiskaveiða: Nøgd, virði og miðalprísur í 2007 og 2008 (Kelda: Hagstova Føroya)*

Í bólkinum "Onnur fiskasløg tilsamans" er avreiðingarnøgdin økt við umleið 3.000 tonsum. Hetta kemst av, at nøgdin av gullaksi øktist við umleið 6.000 tonsum. Góð 19.000 tons av gullaksi vóru avreidd í 2008 í mun til góð 13.000 tons í 2007. Hinvegin trekti tað niður í hesum bólki, at nøgdirnar av skeljadjórum minkaðu við millum 2.000 og 3.000 tonsum.

Talvan í mynd 3 vísir eisini, at avreiðingarprísurin pr. kg., á so at siga øllum fiskasløgunum, er munandi lækkaður frá 2007 til 2008. Einasti miðalprísur, ið heldur sær nøkulunda, er upsaprísurin.

2008 var annars sætta ári á rað, at minking var í toskafiskiskapinum. Veidda nøgdin av toski í 2002 og 2003 var ávikavist góð 38.000 og góð 37.000 tons. Hereftir var ein stór minking niður á góð 25.000 tons í 2004 og smá 19.000 tons í 2005. Í 2006 kom toskafiskiskapurin niður á 13.600 tons, í 2007 niður á 12.829 tons, og í 2008 vórðu avreidd 11.734 tons. Til samanberingar eru í tíðarskeiðnum frá 1999 til 2008 árliga avreidd sløk 23.000 tons av toski í miðal.

Fiskiskapurin eftir hýsu er nú eisini minkaður í fimm ár á rað og var í 2008 komin niður á 7.453 tons, sum bert er 30% av veiðunøgdini í 2003, ið var umleið 24.600 tons. Til samanberingar hava árligu miðalnøgdirnar av hýsu seinastu 10 árini verið góð 17.000 tons.

Eisini upsafiskiskapurin sær út til at hava toppað og 2008 var triðja ári á rað við minking í upsafiskiskapinum. Í søguligum høpi eru sløk 51.000 tons av upsa tó kortini ikki so lítið, tí miðalnøgdin, ið er avreidd seinastu 10 árini er góð 47.000 tons.

## Miðal avreiðingarprísir

Mynd 4 vísir gongdina í miðal avreiðingarprísunum á toski, hýsu og upsa frá 2001 til 2008. Myndin vísir m.a., at vøksturin, ið hevur verið seinastu árini, nú er steðgaður og at serliga prísirnir á toski og hýsu eru minkaðir í 2008. Lækkaðu prísirnir høvdu við sær, at prísstøðið í 2008 kom niður á umleið tað sama sum í 2006, sum tó framvegis er hægri enn fyri árini frá 2001/2002 til 2005.

Seinnu árini hava hækkandi prísir vigað væl upp ímóti minkandi nøgdunum av serliga toski og hýsu. Avbjóðingin hjá vinnuni gerst tí nú so mikið størri, tá prísirnir lækka, samstundis sum nøgdirnar halda áfram at minka.




*Mynd 4. Miðalprísir á toski, hýsu og upsa frá 2001-2008 (Kelda: Hagstova Føroya)*

## Útflutningur av heilum køldum fiski

Síðani ógvusligu hækkingina í tíðarskeiðnum frá 2000 til 2003, hevur útflutningurin av heilum køldum fiski verið javnt minkandi seinnu árini. Eitt undantak var tó útflutningurin av upsa, sum hækkaði nakað í 2005.




| | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Toskur | 3.470 | 4.486 | 10.188 | 8.396 | 6.182 | 4.371 | 3.676 | 1.881 | 1.714 |
| Hýsa | 4.244 | 6.445 | 13.183 | 14.426 | 12.107 | 10.578 | 9.506 | 7.049 | 4.280 |
| Upsi | 1.814 | 5.210 | 11.265 | 13.208 | 9.374 | 11.874 | 4.214 | 3.891 | 1.574 |

*Mynd 5. Útflutningur av heilum køldum fiski (Kelda:Hagstova Føroya)*

Samlaða nøgdin av toski, hýsu og upsa, sum fór óvirkað av landinum í 2008 var 7.568 tons. Hetta vóru góð 5.000 tons minni enn í 2007, tá nøgdin var 12.821 tons. Til samanberingar var samlaða veiðunøgdin av hesum trimum fiskasløgum 81.000 tons í 2007 og 70.000 tons í 2008. Hetta er ein lækking á 11.000 tons og tá útflutningurin av heilum fiski bert er minkaður við 5.000 tonsum, kunnu vit koma til ta niðurstøðu, at samanborðið við 2007 er nøgdin av hesum trimum fiskasløgum, ið er avreidd til føroysk virkir, minkað við øðrum 6.000 tonsum í 2008.

Upp aftur verri gerst myndin, um vit hyggja tvey ár aftur í tíðina, tí samanborið við 2006 eru veiðunøgdirnar í 2008 av toski, hýsu og upsa minkaðar við 20.000 tonsum. Ein lítil helvt av hesari lækking sæst aftur í minni útflutningi av heilum fiski, meðan størra helvtin, ella umleið 10.500 tons, er minni rávøra til føroysku virkini.

## Avreiðingar uttanlands

Mynd 6 vísir gongdina í avreiðingum uttanlands. Seinastu 3 árini hava nøgdirnar verið rættuliga støðugar. Í 2006 og 2007 var talan um knøpp 8.000 tons, og í 2008 er nøgdin farin nakað upp um 8.000 tons. Í mun til árini frá 2002 til 2005, tá rættuliga nógvur fiskur varð landaður uttanlands, kemur tað nú nærum ikki fyri, at toskur og hýsa verður avreidd uttanlands. Nakað av upsa verður framvegis avreiddur uttanlands, men í 2008 var henda nøgd komin niður á 1.800 tons.




*Mynd 6. Landingar uttanlands 2000-2008 (Kelda: Fiskiveiðieftirlitið)*

Einasti bólkur, har nøgdin økist er “Annað”, ið er vaksið frá knøppum 4.000 tonsum í 2007 til til 6.000 tons í 2008. Útgreiningar av hesari nøgd eru ikki fingnar til vega, men hagtølini vísa, at vøksturin stavar frá avreiðingum hjá partrolarum.

## Flakavinnan

Um hugt verður eftir almennu roknskapartølunum fyri 2007, sæst at samlaða úrslitið hjá ráfiskakeyparum var sera vánaligt. Skulu vit lýsa gongdina hjá teimum feløgnum, ið primert eru ráfiskakeyparar er tó helst rættast at korrigera fyri óvanligum niðurskrivingum og úrsliti frá dóttur- og assosieraðum feløgum. Um hetta verður gjørt, fæst eitt samlað úrslit, áðrenn skatt og óvanligar postar, sum gevur eitt hall á umleið 5 mió.kr.

Hóast samlaða myndin ikki sá væl út, var tó ójavnt hvussu 2007 royndist hjá ymisku feløgunum. Á mynd 7 sæst, at 9 feløg høvdu avlop áðrenn skatt, meðan 9 feløg høvdu hall. Feløgini við positivum úrsliti høvdu tilsamans umleið 12 mió.kr. í avlopi, meðan feløgini við negativum úrsliti høvdu tilsamans umleið 17 mió.kr. í halli.

Tað kann eisini viðmerkjast, at áðrenn avskrivingar høvdu 13 av hesum 18 feløgunum tilsamans 55 mió.kr. í avlopi, meðan 5 teirra høvdu eitt samlað undirskot á umleið 4 mió.kr. Áðrenn rentur høvdu 12 feløg eitt samlað avlop á 31 mió.kr., meðan hini 6 høvdu eitt undirskot á knappar 7 mió.kr.




*Mynd 7. Korrigerað úrslit, áðrenn skatt og óvanligar postar, hjá 18 feløgum (Kelda: Vinnuvitan.biz og egnar tillagingar)*

Flestu almennu roknskapirnir fyri 2008 eru ikki tøkir enn, men tað ljóðar frá virkjunum, at myndin helst líkist henni frá 2007. Nøkur virkir kláraðu seg ikki væl í 2008 og okkurt teirra er fyribils latið aftur, meðan onnur hava gjørt nýggjar avtalur við fíggingarstovnar og kunnu tí halda fram.

Ymiskar orsøkir eru óiva til hetta, men ein frágreiðing er, at gjaldføristrupulleikar helst til tíðir hava tarna rakstrinum hjá summum virkjum í 2008, og at tey tá kanska ikki verið so aktiv at bjóða uppá fisk. Tey virkini, ið tá hava havt møguleika at keypt, hava tí helst fingið lutfallsliga bíligari rávøru enn tey annars kundu rokna við.

2008 var annars í nógvar mátar eitt baldrut ár, eisini hjá ráfiskakeyparum. Fíggjarkreppa og búskaparkreppa hava á ymiskan hátt havt ávirkan á okkara arbeiðsumstøður. Millum annað hevur búskaparliga skrallið í Íslandi og tann nógv viknaða íslendska krónan givið okkara íslendsku kappingarneytum ein fyrimun. At norska krónan og bretska pundið eru nógv viknað í mun til evruna og donsku krónuna, hevur eisini havt neiliga ávirkan á kappingarførið hjá føroyskum virkjum. Samstundis mugu vit ásanna, at keypiorkan hjá okkara kundum er hart rakt av gjaldføriskreppuni, ið hevur rakt so at siga allan heimin. Ein avleiðing av hesum er eisini, at í fleiri førum ber ikki longur til at tryggja ágóða frá sølu og tí gerast goymslurnar til tíðir størri enn ætlað.

Flakavinnan hevur annars seinastu nógvu árini havt trupulleikar við at rekruttera starvsfólk til vinnuna. Flakavinnan hevur ikki kláráð kappingina um starvsfólkini við tænastuvinnuna og almenna sektorin. Fyri virkini merkti hetta, at framleiðsluorkan minkaði og framleidni í vinnuni versnaði. Í seinastuni hevur tó verið minni at hoyrt um trupulleikar við væntandi arbeiðsmegi, og eru serliga tvær frágreiðingar til hetta. Onnur er, at møguleikarnir at fáa útlendska arbeiðsmegi eru vorðnir betri, og hin er, at útboðið av arbeiði í øðrum vinnum er vorðið minni.

Samanumtikið kann sigast, at 2009 sær út til at gerast enn eitt avbjóðandi ár fyri føroyskar ráfiskakeyparar. Higartil eru flestu prísir á okkara vørum fallnir, og tað hevur sum heild gingið óvanliga illa at sleppa av við framleiðsluna. Vónir eru tó um, at støðan á heimsmarknaðunum skjótt fer at gerast betri og at tað tá kemur glið á aftur søluna, og at prísirnir samstundis fara at kvinka upp eftir.

## Veiðuliðið

Sum tað eisini er greitt frá frammanfyri, minkaði feskfiskaveiðan úr 121.000 tonsum í 2007 niður í góð 111.000 tons í 2008. Ójavnt er tó, hvussu veiðan royndist hjá ymisku skipabólkunum. Lemmatrolararnir fiskaðu t.d. bert knøpp 22.000 tons, ið er ein triðingur minni enn í 2007. Ein av orsøkunum til hetta var, at høgi oljuprísurin, ið var partar av árinum, noyddi fleiri lemmatrolarar at liggja við kai ella fara í aðra vinnu. Partrolararnir fiskaðu hinvegin góð 63.000 tons, sum er 6.000 tons meir enn í 2007, og samstundis er tann mesta nøgdin, sum hesin skipabólkur nakrantíð hevur fiskað. Línuflotin fiskaði knøpp 22.000 tons í 2008, sum er umleið 4.500 tons minni enn í 2007. Hesin skipabólkur er hart raktur av, at minni er at fáa av toski og hýsu. Garnaskipini hava í fleiri ár havt rímuliga støðugar nøgdir, men tó var ein lítil minking í 2008. Snelluflotin hevði eisini eina afturgongd í nøgdini í 2008, sum hóast hon ikki var so stór í tonsum, kortini svarar til næstan 10%. Samanborið við árini frá 2006 og longur aftur, er tó talan um rættuliga stóra minking í veiðunøgdini hjá snelluflotanum.

| | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Lemmatrol** | 30.627 | 30.609 | 30.878 | 33.264 | 32.503 | 21.813 |
| **Partrol** | 48.607 | 44.962 | 62.811 | 61.912 | 57.238 | 63.282 |
| **Lína** | 46.880 | 40.230 | 34.972 | 32.573 | 26.257 | 21.787 |
| **Snella** | 4.146 | 2.963 | 2.824 | 3.232 | 2.028 | 1.851 |
| **Gørn og annað** | 3.445 | 3.305 | 3.264 | 3.182 | 3.019 | 2.852 |
| **Reiðskapur tilsamans** | 133.704 | 122.069 | 134.748 | 134.162 | 121.045 | 111.585 |

*Mynd 8. Fiskiskapurin hjá heimaflotanum frá 2003-2008 í tonsum (Kelda: Hagstova Føroya)*

Úrslitini hjá flotanum fyri 2008 eru ikki endaliga klár enn, men nógv bendir á, at hesi ikki vera góð. Neyvan slepst undan, at minni nøgdir, lægri fiskaprísir, hægri oljuprísir og hægri fíggjarkostnaðir fara at síggjast aftur í roknskapunum fyri 2008.

## Gongdin fyrstu tveir mánaðirnar av 2009

Verður hugt eftir veiðumynstrinum í fiskiskapinum undir Føroyum fyrstu tveir mánaðirnar í ár, í mun til fyrstu tveir mánaðirnar í 2008 sæst, at fiskiskapurin í ár er nakað tann sami sum í fjør. Bæði árini liggur samlaða veiðunøgdin fyri hesar báðar mánaðirnar um 18.600 tons. Líkt er tó til, at keðiliga gongdin í toska- og hýsufiskiskapinum heldur fram, men veiðan av upsa sær út til at økjast aftur. Nøgdirnar av upsa eru nevniliga øktar við góðum 2.000 tonsum, meðan nøgdirnar av toski og hýsu eru minkaðar við ávikavist knøppum 600 og knøppum

1.000 tonsum. Fyri hýsuna svarar hetta til, at veiðan er umleið helvtina minni fyrstu tveir mánaðirnar av 2009, í mun til sama tíðarskeið í 2008. Viðvíkjandi øðrum fiskasløgum kann viðmerkjast, at nøgdirnar av brosmu og longu er øktar við ávikavist 300 og 200 tonsum.

## Útlitini fyri fiskiskapin undir Føroyum

Í grundgevingunum fyri sínum tilmæli til fiskiskapin undir Føroyum, í fiskiárinum 2008/2009, sigur Havstovan, at stovnarnir av toski á Føroyabanka og á landgrunninum eru søguliga illa fyri, at hýsustovnurin er í skjótari minking, meðan upsastovnurin hinvegin er hampuliga væl fyri. ICES mælti til onga veiðu eftir toski og hýsu í 2009, og at veiða eftir upsa varð skerd við 20%. Í sínum grundgevingunum sigur Havstovan eisini, at best hevði verið at banna allari veiðu eftir toski og hýsu, men at tað vildi elvt til, at næstan allur flotin varð lagdur. Havstovan mælti tí í staðin til, at fiskidagatali hjá línuskipunum og øðrum skipabólkum, ið serliga veiða tosk og hýsu, varð minkað við 50%, meðan fiskidagatalið hjá partrolarunum varð minkað við 20%. Sambært Havstovuni vísa framskrivingar, at hesir niðurskurðir, saman við øðrum reguleringum, vildu fingið toskastovnin at vaksa spakuliga aftur. – Politisk semja fekst tó ikki um tilmæltu niðurskurðirnar og lóggivið varð at enda um ein niðurskurð í fiskidagatalinum uppá 10% hjá øllum skipabólkum.

Samanumtikið mugu vit helst ásanna, at útlitini fyri fiskiskapinum eftir toski og hýsu ikki eru nakað serlig og at tað er mangt, ið bendir á, at veiðunøgdin av toski og hýsu eisini fer at minka í 2009. Hinvegin kann tað kanska liggja ein vón í, at útlitini hava verið líka ring onkuntíð fyrr og at tað tá kortini hevur bragdað aftur.

Upsafiskiskapurin tykist at hava rímulig útlit og tað er okkurt, ið kundi týtt uppá, at nøgdirnar av upsa gerast størri í 2009 enn í 2008. Onnur fiskasløg sum t.d. brosma og longa tykjast at vera ræ ttuliga støðug og helst verður veiðan í 2009 á leiða tann sama ella størri enn í 2008. Veiðan av gullaksi er økt nógv seinnu árini og kom í 2008 upp í móti tí, ið Havstovan metir vera markið fyri burðardyggari veiðu. Hugsast kann tí, at henda nøgd ikki fer at økjast í 2009.

# Virksemi felagsins í farna ári

Niðanfyri er ein stutt lýsing av nøkurm málum, sum hetta seinasta árið hava verið viðkomandi fyri virksemið hjá Føroya Ráfiskakeyparafelag.

Seinast Føroya Ráfiskakeyparafelag hevði aðalfund var 29. apríl 2008. Nevndarlimirnir, ið stóðu fyri vali tá, vóru Simon P. Jacobsen, Páll Gregersen og Petur H. Mohr. Teir vóru allir afturvaldir og hinir nevndarlimirnir eru Joen Magnus Rasmussen og Jógvan Gregersen. Seinni skipaði nevndin seg við Simon P. Jacobsen sum formanni og Joen Magnus Rasmussen sum næstformanni. Hetta var sama skipan sum árið fyri.

## Framtíðin hjá felagnum

Nevndin í Føroya Ráfiskakeyparafelag hevur fyrr sjálv sett spurnartekin við, hvussu umdømi hjá felagnum er, og um felagið arbeiðir nóg málrætta. Tosað hevur verið eitt sindur um grundarlagið fyri felagnum, tvs. hví eru vit til? Felagið hevur helst havt eitt breiðari grundarlag fyrr, men tað er framvegis neyðugt við einum organi, sum kann tala og arbeiða fyri okkara áhugamálum, kanska serliga tá aktuell mál eru frammi. Hinvegin er kanska meira ógreitt, hvørjum yvirskipaðum málum vit royna at røkka. Semja hevur tó verið um, at týdningarmikið er at arbeiða fyri menning av útflutningsviðurskiftunum og at arbeiða proaktivt við kunning um Føroyar, fiskiskap og framleiðslu.

Hugskot hava verið frammi um, antin at umskipa Ráfiskakeyparafelagið ella at stovna nýtt vinnufelag fyri føroysku útflutningsvinnuna. Skotið hevur eisini verið upp, at leggja keypara- og seljarafeløgini saman í eitt nýtt felag, ella finna eina skipan fyri, hvussu hesi bæði, og kanska onnur feløg við, kunnu arbeiða meira saman. Hugsanin aftanfyri hesi hugskot er, at seta fokus á útflutning í staðin fyri keyp og sølu millum skip og virkir. Arbeiðast kann tá meira miðvíst við størri uppgávum, sum t.d. at viðgera spurningin um umhvørvismerking, útflutningsframa, branding av føroyskum vørum o.s.fr.

Nevndin í Føroya Ráfiskakeyparafelag hevur tó ikki fatan av, at áhugin fyri einum nýggjum ella samanløgdum felag hevur undirtøku í seljarafelagnum, og tí er fyribils ikki gjørt meira við hesar tankar. Arbeiðið hjá Føroya Ráfiskakeyparafelag fer tí fram eftir sama leisti sum higartil.

## Arbeiðsmarknaðarspurningurin

Seinnu árini hevur tað verið eitt afturvendandi evni, at flestu fiskavirkir mangla arbeiðsmegi. Arbeiðsloysið í Føroyum hevur í fleiri ár verið sera lágt og lógarforðingar hava gjørt, at sera torført hevur verið at fingi útlendska arbeiðsmegi at arbeiða á virkjunum. Hetta hevur serliga neiliga ávirkan á fiskavirkini, tí hesin parturin av arbeiðsstyrkini er sera mobilur.

Trupulleikin við arbeiðsmegini sýnist nú loksins at vera minkaður, lutvíst tí at møguleikarnir at fáa útlendska arbeiðsmegi nú eru vorðnir betri, men eisini tí at arbeiðsloysið nú er vaksandi og betri møguleikar tí eru at fáa fólk at arbeiða á fiskavirkjunum.

## Útflutningstrygging- og fígging

Í sambandi við gjaldføriskreppuna, ið rakti so at siga allan heimin sera meint í 2008, var ein trupulleiki, at føroyskir fiskaútflytarar mistu tryggingar uppá nakrar av sínum kundum. Avleiðingin av hesum var, at fíggingarstovnar ikki kundu fíggja sølukredittirnar og tí var vandi fyri, at virkini komu at liggja inni við stórum goymslum.

Ráfiskakeyparafelagið hevur fylgt við hesum trupulleika og luttók í desember á einum fundi í Eksport Kredit Fonden (EKF), saman við umboðum fyri Vinnumálaráðið. Endamálið við fundinum var at kanna hvørjar møguleikar føroyskir útflytarar hava fyri at brúka tilboð hjá EKF.

Tað nýggjasta í hesum máli er, at EKF hevur biðið ES um undantaksloyvi til at endurtryggja sølu til keyparar í ES og OECD londum. Enn er hetta loyvi tó ikki givið.

Líkt er annars til, at støðan sum heild er batnað nakað á hesum øki. Í løtuni frættir felagið einki um, at virkir hava aðrar trupulleikar við tryggingum, enn teir tey eisini høvdu havt undir vanligum umstøðum.

## Kassamiðstøðin

Føroya Ráfiskakeyparafelag eigur helmingin av partapeninginum í P/F Miðstøðini, sum rekur kassamiðstøðina á Toftum.

Summir limir í felagnum hava verið ónøgdir við verandi kassa- og flutningsskipan hjá Kassamiðstøðini (KMS) og hava tosað um at taka seg úr skipanini. Fyri at kanna um møguleiki var fyri at tillaga skipanina soleiðis, at áhugi framvegis var hjá øllum at halda fram,

tók felagið stig til ein partaeigarafund í KMS. Á hesum fundi varð avtalað, at nevnd og stjórn í P/F Miðstøðini skuldu viðgera spurningin og venda aftur.

Leiðslan í P/F Miðstøðini, hevur síðani greitt frá, at KMS ikki ætlar at gera nakrar tillagingar nú, men metur tað vera skilagott at bíða til framtíðarútlitini vera meira støðug. Nevndin í Føroya Ráfiskakeyparafelag hevur tikið hesa støðu til eftirtektar og hevur avgjørt fyribils ikki at gera meira við hetta málið.

Á aðalfundinum hjá P/F Miðstøðini fekk Føroya Ráfiskakeyparafelag annars nýggjan lim í nevndina fyri Egil Olsen, ið ikki ynskti at halda fram. Nýggjur nevndarlimur er Erlendur Johannesen, virkisleiðari hjá Faroe Seafood í Runavík. Hitt umboði hjá Føroya Ráfiskakeyparafelag í nevndini hjá P/F Miðstøðini er Petur H. Mohr.

Føroya Ráfiskakeyparafelag ynskir hervið at takka Egil Olsen fyri mongu árini hann hevur umboða felagið í nevndini hjá KMS.

## Elektrónisk sporførisskipan

Eitt annað felag, sum Føroya Ráfiskakeyparafelag eigur partapening í, er Føroya Sporførisskipan, sum felagið eigur saman við Føroya Ráfiskaseljarafelag.

Føroya Sporførisskipan hevur í fleiri ár arbeitt við at menna eina elektroniska farleið til sporføris- og hagtalsupplýsingar frá vinnuni til almennar stovnar, og millum ymisku liðini í virðisketuni frá fiskiskapi til keyparan á altjóða marknaðinum. Skipanin skal fevna um øll lið í virðisketuni - skip, landingarmiðstøðir, fiskamarknaðir, flutningsfeløg, framleiðsluvirkir, fiska-sølur og útflutningsfeløg.

Miðjað hevur verið ímóti, at Føroyar kundu gerast fyrsta land í heiminum, har allur fiskur er digitalt sporførur av grunni at munni. Tað hevur verið hildið, at hetta kundi geva føroyskum fiskavørum ein kappingarfyrimun á marknaðinum.

Tað hevur tó tíverri víst seg, at ganga ógvuliga strilti við at menna hesa skipan so mikið lidna, at hon kann takast í nýtslu. Royndarkoyringar eru tó gjørdar av ymiskum modulum í skipanini og hevur hetta sæð lovandi út. Fyrr í ár upplýsti stjórin í Føroya Sporførisskipan, á framløgudegi, ið varð hildin á Vinnuháskúlanum, at skipanin fór at vera sett í verk í hesum árinum. Seinni í hesum mánaðinum verður aðalfundur í Føroya Sporførisskipan og tá fæst helst nærri at vita, hvussu langt ætlanin er komin. Tað kann eisini hugsast, at ein nýggj ES-fyriskipan um ólógligan, ófráboðaðan og óskipaðan fiskiskap (IUU fishing), sum kemur í gildi 1. januar 2010, kemur at seta ferð á menningina av sporførisskipanini.

## Ólógligur, ófráboðaður og óskipaður fiskiskapur (IUU fishing)

Tann 29. september 2008 samtykti ES-ráðið eina nýggja fyriskipan um ólógligan, ófráboðaðan, og óskipaðan fiskiskap (Illegal, Unreported and Unregulated (IUU) Fishing), sum kemur at hava stóran týdning fyri øll, ið fiska og útflyta fisk og fiskavørur til ES marknaðin. Henda fyriskipan kemur í gildi 1. januar 2010.

Sambært grundgevingunum fyri fyriskipanini er endamálið, at forða fyri teimum oyðileggjandi skaðum á fiskastovnar v.m., sum standast av IUU fiskiskapi. ES marknaðurin er størsti innflytari av fiskavørum í heiminum, og metir ES seg tískil hava skyldu til, at hava eina lyklastøðu í stríðnum móti IUU fiskiskapi.

Fyriskipanin verður galdandi fyri øll fiskifør uttan mun til hvørjum flaggi tey sigla undir, og hvar tey fiska.

Høvuðsamboðið til tess at náa endamálinum, verður ein eftirlitsskipan, ið nágreiniliga kann staðfesta hvar fiskurin er veiddur. Allur fiskur, virkaður ella óvirkaður, skal hava eitt Catch Certification Scheme (eftir hetta nevnt CCS-skjal) sum eina váttan uppá, at veiðan er farin fram eftir reglunum í nýggju fyriskipanini.

Sambært fyriskipanini skal allur fongur, um hann er veiddur í ES sjóøki, ella sjóøki hjá einum triðja landi, hava CCS-skjalið, áðrenn hann kann verða fluttur inn á ES marknaðin. CCS-skjalið skal stava frá fiskifarinum sum veiddi fongin. CCS-skjalið skal vera vátta, av einum almennum myndugleika í tí landi har fiskifarið er skrásett. Hetta er eisini galdandi um vøra verður flutt frá triðja landi til triðja land, og síðani skal inn á ES marknaðin. Um CCS-skjalið ikki er útfylt sambært fyriskipanini, verður noktað farinum, at landa vøruna í ES havnum.

Eftirlitsskipanin við CCS skjalinum verður løgd út til ymisku londini at umsita sjálvi.

Fyrireikingararbeiði til hesa eftirlitsskipan er í løtuni í gongd í Fiskimálaráðnum, men Føroya Ráfiskakeyparafelag eigur at fylgja við og tryggja sær, at føroyskir myndugleikar eru klárir við einari loysn í góðari tíð áðrenn ES-fyriskipanin verður sett í verk.

## Umhvørvismerking

Spurningurin um umhvørvismerking gerst alsamt meira átrokandi, men í Føroyum er eingin felags linja á hesum øki. Sum í so mongum øðrum vinnuligum viðurskiftum er stór ósemja um vit eiga at ganga hesa leiðina ella ikki, og tí hendir ikki tað stóra við hesum spurningi. Umboð fyri skip og virkir hava havt onkran fund við myndugleikarnar, við tí endamáli, at fáa eina innanhýsis meting av, hvørt vit lúka treytirnar fyri burðardyggari veiðu ella ikki. Einki

ítøkiligt spurdist tó burtur úr hesum fundum. Um vit hyggja eftir treytunum fyri burðardyggari umsiting av fiskastovnunum, tilráðingunum frá Havstovuni/ICES og hvussu vit veruliga veiða, er tó ikki nógv, ið bendir á, at vit í løtuni kunnu fáa nakra góðkenda umhvørvismerking av okkara toska- og hýsuvørum.

Føroya Ráfiskakeyparafelag hevur havt leysligt samskifti við umboð fyri okkurt umhvørvismerki, og vit kunnu útfrá hesum siga, at møguleiki kanska er at fáa upsan umhvørvismerktan. Eitt ivamál í hesum sambandi er tó, at stovnsmetingarnar av upsanum eru nakað óvissar.

Í felagnum mugu vit tó ivaleyst ásanna, at umhvørvismerking neyvan er nakað, sum vinnan verður samd um í bræði. Skal nakað henda á hesum øki, má initiativið tí helst koma frá einstøkum aktørum í vinnuni. Nevnast kann í hesum sambandi, at Felagið Nótaskip hevur avgjørt at biðja um MSC-góðkenning til partar av teirra fiskiskapi. Nevnast kann eisini, at felagið O.C. Joensen á Oyri hevur biðið um MSC-góðkenning.

## Eftirlitsvitjan úr ES

Fleiri virkir høvdu í fjør vitjan av eftirlitsmyndugleikum úr ES. Eftirlitið var sum so ikki av sjálvum virkjunum, men av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni (HFS). Endamálið hjá ES-myndugleikunum, var at tryggja sær, at HFS fremur sítt eftirlit á nøktandi hátt.

Ráfiskakeyparafelagið hevði ein leiklut í hesi vitjan, á tann hátt, at vit samskipaðu kunning millum virkini. Hetta varð gjørt soleiðis, at tey virkir, ið fyrst fingu vitjan, boðaðu frá hvat ES-fólkini løgdu dent á. Á henda hátt høvdu tey virkir, ið vóru seinni í røðini, møguleika at taka hædd fyri hesum.

Aftan á vitjanina hevur Ráfiskakeyparafelagið eisini skipað fyri einum fundi millum umboð fyri HFS og vinnuna, har niðurstøðurnar frá ES-vitjanini vórðu gjøgnumgingnar.

## Fundur við fiskimálaráðharran

Nýtt landsstýrið varð skipað í september mánaða, og nakað eftir hetta bjóðaði felagið Jacob Vestergaard, fiskimálaráðharra og Rógva Reinert, aðalstjóra í Fiskimálaráðnum til ein óformellan døgurða. Allir nevndarlimirnir luttøku á hesum fundi og var hetta eitt gott høvi til at føra síni sjónarmið fram, og hoyra hvørjar ætlanir politiski myndugleikin hevði á fiskivinnuøkinum. Einki ítøkiligt kom fram á fundinum, men nevndin var samd um, at hetta var ein góður fundur.

## Bóklingar

Sum eina ásannan av stóru avbjóðingum við manglandi umhvørvismerking, hevur Ráfiskakeyparafelagið fyrr tikið stig til at gera ein bókling, sum skuldi lýsa føroysku fiskiveiðuskipanina. Hugskotið bygdi á, at limirnir í felagnum skuldu hava tilfar tøkt at geva keyparum og samstarvsfeløgum um tørvur var á tí. Arbeiðið við hesum bóklingi varð yvirtikið av Fiskimálaráðnum og var liðugt í apríl 2008. Bóklingurin, ið fekk heitið “Faroe Islands Fisheries & Aquaculture” við undirheitinum “Responsible Management for a Sustainable Future”, var sostatt tøkur til ESE í fjør.

Í heyst hevði felagið ætlanir um at fara undir at gera ein nýggjan bókling, ið skuldi lýsa heilsuágóðar við at eta fisk. Hugskotið var aftur, at limirnir kundu brúka hetta sum kunningarella sølutilfar. Ætlanin var, at samstarva við SamVit um henda bókling, men tíverri er hetta arbeiði fyribils steðgað eitt sindur upp.

## Ráðstevna seinni í vár

Felagið hevur saman við m.a. SamVit tikið stig til at skipa fyri einari ráðstevnu, ið eftir ætlan verður hildin saman við Fish Expo Faroes síðst í mai. Fyrireikingarnar eru komnar væl áleiðis og sær ráðstevnan sera spennandi út. Millum fyrilestrahaldararnar eru Klaus Nielsen frá Espersen A/S, ið heldur fyrilestur við heitinum *"How Espersen has changed from producing fillets based on local resources to a large market oriented company with global sources"*. Jonathan Banks frá Nielsen, ið fer at tosa um *“Seafood and the European Consumer”* og Anthony Hilton frá Evening Standard, ið setir spurningin *“The global Economic crisis - can the world afford to eat?"*

## Ymisk mál

Felagið hevði fyrr í ár lagt ein limafund til rættis í Suðuroynni. Tíverri var eingin undirtøka fyri hesum fundi og varð han tí avlýstur.

Í fleiri umførum hevur spurningurin um hámark fyri avreiðingum uttanlands og kravið um at óvirkaður fiskur skal um uppboðssølu áðrenn hann verður útfluttur, verið alment frammi. Hetta eru spurningar, sum full semja ikki er um í felagnum, og tí hevur felagið sjálvt ikki vilja lagt seg so nógv út í hetta orðaskifti.

Nýggj matvørulóg hevur verið til hoyringar og hevur felagið í hesum sambandi latið Vinnumálaráðnum hoyringsskriv.

Kunngerðin um flutningsstuðul er broytt, soleiðis at stuðulin er minkaður, serliga til tey øki, ið nú hava fast samband við gamla meginøkið.

Umboð fyri føroyskar myndugleikar hava tikið lut á fundum hjá undirnevnd hjá COFI og á 28. fundinum hjá COFI, ið er fiskivinnunevndin hjá FAO. Umboð fyri vinnuna hava eisini møguleika at luttaka á hesum fundum, men fyribils hava vit valt bert at taka lut á teimum fyrireikandi fundunum, ið hava verið fyriskipaðir av almennu myndugleikunum, áðrenn teirra umboð eru farin avstað.

## Skjal 1: Fiskavøruútflutningur í 2007 og 2008

Útflutningsvirði er gjørt upp í FOB.
Kelda: Hagstova Føroya, dagført 17. mars 2009

| | **Virði í 1.000 DKK** | | | **Nøgd í tonsum** | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | **2007** | **2008** | **Munur** | **2007** | **2008** | **Munur** |
| Annar fiskur, i.a.n. | 496.113 | 252.997 | -243.115 | 60.813 | 34.127 | -26.686 |
| Annar ídnaðarfiskur, i.a.n. | 2.190 | 6.365 | 4.174 | 1.689 | 966 | -723 |
| Blálonga | 22.476 | 10.841 | -11.635 | 1.602 | 805 | -797 |
| **Brosma** | **45.511** | **39.276** | **-6.235** | **1.828** | **1.604** | **-224** |
| Búrfiskur | 236 | 1.525 | 1.289 | 14 | 85 | 71 |
| **Gullaksur** | **50.924** | **80.144** | **29.220** | **3.728** | **7.146** | **3.419** |
| Havtaska | 126.574 | 59.602 | -66.971 | 3.492 | 1.315 | -2.177 |
| Hávur | 3.028 | 1.397 | -1.631 | 247 | 119 | -128 |
| Hummari | 6.695 | 8.305 | 1.610 | 43 | 54 | 11 |
| Hvítingur | 18.248 | 10.109 | -8.138 | 1.117 | 690 | -427 |
| **Hýsa** | **322.288** | **171.295** | **-150.993** | **12.966** | **7.536** | **-5.430** |
| Jákupsskel | 7.599 | 9.782 | 2.183 | 142 | 239 | 98 |
| Kalvi | 21.140 | 8.740 | -12.400 | 360 | 190 | -171 |
| Kikarafiskur | 199 | 451 | 252 | 45 | 64 | 18 |
| Kongafiskur | 56.958 | 52.280 | -4.678 | 3.927 | 3.695 | -233 |
| Krabbi | 13.007 | 9.614 | -3.393 | 111 | 131 | 20 |
| Laksur | 488.120 | 810.398 | 322.278 | 16.615 | 30.269 | 13.654 |
| Langasporl | 8.358 | 6.232 | -2.126 | 885 | 639 | -246 |
| Livur | 6.637 | 6.828 | 191 | 1.077 | 276 | -801 |
| Lodna | 29.148 | 11.688 | -17.460 | 21.430 | 6.359 | -15.071 |
| **Longa** | **75.946** | **85.807** | **9.862** | **2.648** | **2.930** | **282** |
| Lýsi | 12.350 | 379 | -11.971 | 2.524 | 55 | -2.468 |
| Lýsingur | 4 | 928 | 925 | 0 | 291 | 291 |
| Makrelur | 204.359 | 174.749 | -29.610 | 51.286 | 28.372 | -22.913 |
| Nebbasild | 2.654 | 376 | -2.279 | 2.489 | 58 | -2.431 |
| Onnur skeljadjór o.l. i.a.n. | 1.640 | 758 | -882 | 2.992 | 2.386 | -606 |
| Reyðsprøka | 18.982 | 19.174 | 192 | 619 | 601 | -18 |
| Rogn | 9.250 | 7.201 | -2.049 | 410 | 327 | -83 |
| Rækjur | 91.559 | 113.019 | 21.460 | 6.522 | 8.777 | 2.256 |
| Síl | 100.767 | 137.511 | 36.744 | 4.500 | 6.185 | 1.685 |
| Sild | 112.270 | 146.437 | 34.167 | 40.012 | 49.736 | 9.724 |
| Skrubba | 684 | 166 | -519 | 47 | 36 | -10 |
| Skøta | 2.278 | 1.503 | -776 | 169 | 162 | -7 |
| Slógv | 31.987 | 33.407 | 1.420 | 27.746 | 29.722 | 1.976 |
| Steinbítur | 3.895 | 4.540 | 645 | 97 | 124 | 26 |
| Stinglaksur | 18.258 | 17.968 | -290 | 1.021 | 1.109 | 88 |
| Svartkalvi | 49.008 | 67.798 | 18.790 | 2.014 | 3.445 | 1.431 |
| Svartkjaftur | 184.368 | 52.410 | -131.957 | 68.031 | 56.811 | -11.221 |
| **Toskur** | **639.455** | **601.771** | **-37.685** | **13.927** | **13.302** | **-625** |
| Tunga | 18.397 | 8.107 | -10.290 | 596 | 357 | -238 |
| **Upsi** | **488.572** | **494.618** | **6.045** | **29.664** | **27.985** | **-1.679** |
| | | | | | | |
| **Tilsamans** | **3.792.992** | **3.526.882** | **-266.111** | **389.754** | **329.164** | **-60.590** |